**UTTAN ÚR HEIMI**

## Danskir bankar hava hall

Hóast danski bankaheimurin hevði metstórt avlop á roknskapinum fyri fyrra hálvár í ár, vísir ein uppgerð hjá Fíggjareftirlitinum, at tólv prosent av teimum donsku peningastovnunum høvdu hall í sama tíðarskeiðinum.

Uppgerðin vísir, at tað eru serliga smáir sparikassar og bankar, sum bert fáast við ávíst virksemi, sum hava alt við at fáa endarnar at røkka saman. Í Fíggjareftirlitinum hava tey heft seg við, at av teimum 21 peningastovnunum, sum høvdu hall fyrra hálvár, hava 16 havt hall á ársroknskapinum minst tvær ferðir tey seinastu fimm árini. Hetta órógvar eftirlitið, tí júst tey seinastu fimm árini hava verið góð inntøkuár hjá donskum peningastovnum.

Fíggjareftirlitið sigur, at hóast teir 21 peningastovnarnir, sum høvdu hall í fyrra hálvári, bert eru ein lítil partur av danska fíggjarheiminum, hava teir fleiri túsund viðskiftafólk.

## Vánaligt kappingarføri

Norðurlendsk vinnulívsfólk eru á einum máli um, at Noreg er tað av Norðurlondunum, sum er ringast fyri, tá tað snýr seg um kappingarføri. Tað vísir ein kanning, sum stovnurin SAP hevur gjørt.

Stovnurin hevur spurt 200 vinnulívsfólk í Noregi, Danmark, Svøríki og Finnlandi um kappingarførið í teimum fýra londunum, og 58 prosent av teimum siga, at Noreg er ringast fyri í so máta. Tey donsku vinnulívsfólkini halda, at Danmark er best fyri, og tey finsku halda, at Finnland er best fyri. Norsku og svensku vinnulívsfólkini hava Finnland á fyrsta plássi.

Norsku vinnulívsfólkini, sum vóru við í kanningini, vilja vera við, at norska vinnan hevur ikki nóg góðar karmar at virka innanfyri. Eisini kæra tey seg um, at tað almenna ger munandi meiri fyri at hjálpa eitt nú oljufeløgunum út á altjóða marknaðin enn øðrum vinnugreinum.

## Nógv kokain í Arlanda

Tollararnir íi Stockholm-floghavnini Arlanda gjørdu eitt rættiligt kvetti í síðstu viku, tá teir komu fram á eina kvinnu, sum hevði millum tólv og fjúrtan kilo av kokaini í viðførinum.

Tollararnir fingu illgruna til kvinnuna, tá tað vísti seg, at var komin við einum flogfari, sum hevði millumlent í Spania á vegnum úr Brasil til Svøríkis. Teir hildu tað harafturat vera løgið, at kvinnan hevði ikki minni enn nítjan dunkar av hársápu og húðsmyrsli í viðførinum. Hesin illgruni vísti seg eisini at vera rættur, tí í teimum 19 dunkunum funnu tollararnir millum tólv og fjúrtan kilo av kokaini. Sjálv hevur kvinnan sagt, at hon keypti dunkarnar í Brasil, men at hon ikki visti, hvat var í teimum.

Sambært ovastanum hjá tollarunum í Arlanda, Anders Edstrøm, hava teir ongantíð funnið so nógv kokain í einum fyrr.

## Hjálparmaður Hitlers deyður

Ein av næstu medarbeiðunum hjá Adolfi Hitler, Otto Gunsche, er deyður, 86 ára gamal.

Tað var Otto Gunsche, sum brendi líkini av Hitler og Evu Braun, eftir at tey høvdu beint fyri sær tann 30. apríl í 1945. Hann var yvirmaður í SS og var ein av teimum persónligu hjálparmonnunum, sum Hitler hevði ta seinastu tíðina. Í einari samrøðu herfyri segði Gunsche, at tað var Hitler sjálvur, sum hevði givið sær boð um at brenna líkini.

Russararnir tóku Otto Gunsche, tá teir tóku Berlin, og hann sat í russiskari fangalegu í fleiri ár. Tá hann slapp leysur, flutti hann til Vesturtýsklands. Hann búsetti seg í býnum Lohmar tætt við Bonn, og har doyði hann.

# Ísraelska álopið á Rafah er krígsbrotsverk

**Ísraelska álopið á palestinsku flóttafólkaleguna Rafah var alt ov ógvusligt, sigur ST. Krígsbrotsverk, sigur Amnesty International**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

– Eg eri ikki serfrøðingur í tunlum. Men eg hevði ikki nýtt stríðstyrlur og rakettir, skuldi eg oyðilagt ein tunnil, sigur danin Peter Hansen, sum er leiðari í ST-deildini UNRWA, sum viðger palestinsk flóttafólkaviðurskifti.

Hann hevur vitjað flóttafólkaleguna Rafah, sum 40 ísraelskir stríðsvognar og fleiri tyrlur søktu at um vikuskiftið og aftur gjáranáttina. Peter Hansen sigur, at ísraelska álopið var óneyðuga ógvusligt. Minst 120 palestinsk hús vórðu løgd í oyði við tí úrsliti, at umleið 1500 fólk gjørdust heimleys.

Peter Hansen sigur, at ísraelska framferðin er greitt brot á altjóða reglur.

Tað sama sigur mannarættindafelagsskapurin Amnesty International, sum sigur álopið vera krígsbrotsverk.

Ísraelssmenn siga, at endamálið við álopinum var at oyðileggja nakrar tunlar ímillum Rafah og egyptiskt land, tí teir halda, at palestinararnir smugla vápn ígjøgnum tunlarnar.

# Drápsmaður fyri rættin



*Í gjár byrjaði rættarmálið ímóti tí 42 ára gamla John Muhammad, sum er ákærdur fyri at hava skotið trettan fólk nærhendis Washington í oktober í fjør. Hann og tann tá 17 ára gamli Lee Malvo skutu í fleiri dagar tilvildarlig fólk, áðrenn tað eydnaðist løgregluni at taka teir. Tá høvdu teir dripið tíggju fólk og sært trý*

*Mynd: Reuters*

# Aftur ein gøla í norsku oljuvinnuni

**Fyri stuttum varð avdúkað, at Statoil hevur verið uppi í sera ivingasomum viðurskiftum í Iran. Nú er komið fram, at Norsk Hydro í loyndum hevur goldið stýrinum í Angola stórar upphæddir fyri rættindi at leita eftir olju**

OLJUVINNA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Avdúkingin kemur stak illa við, tí herfyri avdúkaðu Altjóða Gjaldoyragrunnurin og bretska blaðið Financial Times, at angolski forsetin hevur stungið ein fittan part av landsins oljuinntøkum í egnan lumma.

Altjóða fjølmiðlar og onnur vilja vera við, at Norsk Hydro hevur goldið angolsku myndugleikunum 750 milliónir krónur fyri rættindi at leita eftir olju har. Tað er í sær sjálvum ikki nakar trupulleiki, men trupulleikin er, at norska felagið hevur hildið gjaldið loyniligt eftir boðum frá angolska stýrinum. Statoil, sum eisini er virkið í Angola, hevur eisini rindað angoslku myndugleikunum pengar fyri rættindi, men hevur almannakunngjørt gjaldið. Sambært Financial Times hevur Norsk Hydro eisini stovnað fleiri feløg í Angola, og hóast pengarnir eru fluttir feløgunum og síðani myndugleikunum, sæst tað ongastaðni í roknskapinum.

Kunningarstjórin hjá Norsk Hydro, Tor Stenum, váttar fyri Aftenposten, at tølini eru loynilig, men hann vísir á, at pengarnir eru goldnir teimum almennu myndugleikunum. Men sambært Altjóða Gjaldoyragrunninum er lítil uggi í tí, tí sambært grunninum endar ein fitur partur av pengunum í lummanum hjá forsetanum.



Mentanarhúsið í Fuglafirði:

# Klandur og gamalt agg oyðileggur

**- Tað er ógvuliga harmiligt, at gamalt agg og øvundsjúka skuldi gera enda á tí virksemi, sum leiðarin og hansara fólk skaptu í Mentanarhúsinum í Fuglafirði. Nógv fólk vitjaðu húsið, og har var altíð gott skil í. Tað verður tungt at lyfta arvin eftir leiðaran og hansara fólk, sigur Eyðun Hansen, fráfarni formaðurin í Fuglafjarða Sjónleikarfelag**



*Tað er stórt spell, at fólk, tú næstan ikki hevur sæð í húsinum, soleiðis koma og oyðileggja tað arbeiði, sum her er gjørt. Ja, eg má siga, at hetta er ógvuliga harmiligt – og næstan grátuligt, sigur fráfarni formaðurin í Fuglafjarða Sjónleikarfelag*

MENTANARHÚSIÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eyðun Hansen, sum hevur verið formaður í Fuglafjarða Sjónleikarfelag seinastu 12 árini, er ikki formaður í felagnum longur. Saman við næstformanninum, Peturi Abrahamsen og eykaliminum, Alexandru Georgdóttir, hevur hann tikið seg úr nevndini.

Tað er Fuglafjarða Sjónleikarfelag, sum eigur og rekur Mentanarhúsið í Fuglafirði.

Dagligi leiðarin í Mentanarhúsinum, Jonhard Hammer, hjálparmaður hansara og kokkurin, eru eisini givnir.

### Agg og øvundsjúka

Eyðun Hansen sigur, at hann trekti seg sum formaður, tí gamalt agg og øvundsjúka gjørdi, at ávísir limir í nevndini alla tíðina vóru til reiðar at søkja at leiðaranum. Sum tíðin leið, vórðu hesar kreftir við meiriluta í nevndini, sum taldi 5 nevndarlimir og tveir eykalimir.

- Hetta kundi eg sum formaður ikki hava sitandi á mær. Eg haldi, at Jonhard og hansara fólk hava gjørt eitt stórt og gott arbeiði fyri Mentanarhúsið, síðan húsið læt upp í juni mánaði í fjør. Eg haldi ikki, at nøkur orsøk var at reisa slíka ónøgd um leiðsluna. Tí valdi eg at trekkja meg.

Fyrrverandi formaðurin sigur, at hópur av tiltøkum hava verið í Mentanarhúsinum, og nógv lá fyri framman, nú veturin og jólini stunda til. Men nú fara mong tiltøk fyri bakka.

- Eg haldi, at tey, sum íbyrtu hesa ónøgd og seinni fingu undirtøku fyri henni, í dag standa sum spurnartekin.

Eyðun sigur, at síðan ein partur av nevndini vendi sær ímóti dagligu leiðsluni, hevur hann umhugsað at taka seg aftur sum formaður, og tað er hetta, hann hevur gjørt.

### Eykaaðalfundur

Fyrrverandi formaðurin harmast um tað, sum er hent, tí nógv tíð og orka liggur aftanfyri Mentanarhúsið.

- Tað er stórt spell, at fólk, tú næstan ikki hevur sæð í húsinum, soleiðis koma og oyðileggja tað arbeiði, sum her er gjørt. Ja, eg má siga, at hetta er ógvuliga harmiligt – og næstan grátuligt.

Limir í Fuglafjarða Sjónleikarfelag hava biðið um ein eykaaðalfund, sum verður 24. oktober.

Spurdur, um hann kundi hugsað sær at tikið við leiðsluni aftur, um undirtøka er fyri hesum, sigur Eyðun:

- Nei, eg taki ikki við aftur formanssessinum í felagnum. Tað, sum er farið, er farið. Eg havi brúkt nógva tíð í Mentanarhúsinum, og nú fari eg at taka mær meira av familjuni.

Eyðun sigur, at hann ætlar sær kortini at møta upp á eykaaðalfundinum.

### Tungur arvur

Hann vísir á, at tað gekk væl í Mentanarhúsinum í Fuglafirði, og sum formaður í felagnum, var hann ógvuliga væl nøgdur við leiðsluna.

- Hóast nógv fólk vóru til ymisku tiltøkini í húsinum, var altíð gott skil í – ja, sjálvt løgreglan í Runavík hevur róst okkum fyri, hvussu gott skil hevur verið í, tá ið teir hava verið á vitjan.

Eyðun sigur, at øll viðurskiftini við húsinum vóru ikki komin uppá pláss, men ætlandi skuldi tað, sum restaði í, koma undir land nú í november, eitt nú viðurskiftini við Fuglafjarða kommunu.

- Eg eri spentur eftir at síggja, hvat nýggja leiðslan í Fuglafjarða Sjónleikarfelag og Mentanarhúsinum fer at megna at stilla upp ímóti tí, sum var. Jonhard var ein framúr góður leiðari, og tað verður tungt at lyfta arvin eftir hann og hansara fólkum í Mentanarhúsinum, sigur Eyðun Hansen.

Fuglafjarða Sjónleikarfelag hevur umleið 200 limir.

# Leirvíkingar samtykkja grótkast og arbeiðsveg

ARBEIÐI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Sjúrður Eliasen er bygdarráðsformaður í Leirvíkar kommunu*

Leirvíkar bygdarráð samtykti einmælt á fundi, 6. oktober, at byggja grótkast á Kráartanga og arbeiðsveg í Buginum, teir rópa. Samtykt er, at arbeiðini skulu gerast í samráð við Landsbyggifelagið og ráðgeving frá DHI, og at kommunurnar partur av verkætlanini í mesta lagi verður 5 milj. krónur.

Leirvíkar kommuna ætlar at fíggja hesa íløgu við lántøku, og ynskiligt er, at trý tey fyrstu árini verða avdráttarfrí.

Í samtyktini fær bygdarráðsformaðurin heimild at samráðast við landsstýrið um frávik í íløgukarminum og um lántøkuna.

- Ætlanin skal fremjast saman við Norðoyartunlinum, Klaksvíkar kommunu og møguliga øðrum áhugaðum kommunum.

Samtyktin áleggur bygdarráðsformanninum beinanvegin at taka upp samráðingar við Norðoyartunnilin og Klaksvíkar kommunu um arbeiði og saman við pørtunum gera ein sáttmála, sum skal fevna um alt arbeiðið.

Sáttmálin skal góðkennast av bygdarráðnum.

Leirvíkar bygdarráð metir hetta málið hava stóran skund, og heimilar tí formanninum at nýta alla ta serkønu hjálp, hann heldur vera neyðuga fyri at fáa málið avgreitt sum skjótast.

Samtykt er eisini, at bygdarráðsformaðurin við jøvnum millumbilum skal kunna bygdarráðið um gongdina í málinum